# Løgmansskrivstovan

**Løgtingið**

Dagfesting: xx. februar 2019
Mál nr.: 19/00084
Málsviðgjørt: KTH
Eftirkannað:

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum** (Yvirtøka av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum
(Yvirtøka av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018, verður í § 1, stk. 2, nr. 18 “, sjóuppmerking og vitaverk” strikað.

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk.

Yvirtøkan er ikki nevnd í samgonguskjalinum, men hóast hetta ynskir landsstýrið at yvirtaka økini, m.a. tí tey hava tætt tilknýti til øki, sum eru á føroyskum hondum, heruppií trygd á sjónum, sum bleiv yvirtikið í 2002, og kort- og landmátingarmyndugleikan, sum samgongan hevur yvirtikið við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018 um broyting í lóg um ræði á málum og málsøkjum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Málsøkini eru í stóran mun stýrd á ólógásettum grundarlagi. Kortini er lóg nr. 68 af 29. marts 1893 om Afståelse af Grund til Fyranlæg m.m. galdandi á økinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk sum føroyskt sermál. Við uppskotinum yvirtaka føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarligu ábyrgdina á málsøkjunum.

Yvirtøkan fevnir um 26 vitar, sum verða riknir frá gomlu Loranstøðini á Eiði[, sum eisini er fevnd av yvirtøkuni]. Yvirtøkan fevnir harafturat um onnur sjómerki (í løtuni tvey flótandi sjómerki), starvsfólk, alla rakstrarútgerð, sum knýtt er at vitunum, og rakstrarútgerð í DGPS-støðini á Bøllureyni. Føroyskir myndugleikar yvirtaka eisini ábyrgdina av avtalum og samstarvið, sum Søfartsstyrelsen hevur við m.a. Arktisk Kommando, MRCC og Landsverk.

Sambært yvirtøkulógini eru tænastubústaðirnir til starvsfólk á Eiði, Borðuni og í Mykinesi ikki partur av yvirtøkuni. Søfartsstyrelsen hevur tó upplýst, at arbeitt verður fram ímóti, at bústaðirnir, sum eru tætt knýttir at rakstrinum av vitaverkinum, verða latnir føroyskum myndugleikum í samband við yvirtøkuna av vitaverkinum. Hetta skal leggjast fyri Folketingets Finansudvalg.

Við yvirtøkuni av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk verður økið um bjarging av skipsrovum v.m., ið eru til vanda ella veruligan ampa fyri sigling og fiskiskap, sum í dag er reglubundið við Norsku lóg og rættarsiðvenju, eisini yvirtikið.

Samstundis sum hetta lógaruppskot er lagt fyri Løgtingið, er lagt eitt lógaruppskot fyri Løgtingið um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum, sum m.a. skal tryggja, at uppgávur, sum í dag eru lagdar donskum myndugleikum á sjóuppmerkingarøkinum, yvirtøkudagin 1. januar 2020 verða lagdar tilsvarandi føroyskum myndugleikum.

Í aðrar mátar stendur verandi lóggáva á økinum við, sbr. § 5 í yvirtøkulógini, sum er løgtingslóg nr. 79 frá 12. mai 2005, og sbr. § 13 í heimastýrislógini, sum er lov nr. 11 frá 31. mars 1948.

### 1.4. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur, saman við lógaruppskoti um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum, verið í hoyring hjá Landsverki, Sjóvinnustýrinum, MRCC, Vørn, Arktisk Kommando og Samferðslumálaráðnum.

Innkomnu ummælini eru hjáløgd sum fylgiskjal 4 .

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður, at samlaði kostnaðurin av yvirtøkuni verður 4,5 mió. kr. og tí verður mælt til, at henda upphædd verður sett av til økini á komandi fíggjarlógum.

Av samlaða kostnaðinum er stórsti parturin til raksturin av vitaverkinum. At umsita vitaverkið krevur trý ársverk umframt 10 samsýntir vitapassarar (samsvarandi 1 ársverk).

Landsstýrið yvirtekur ognir fyri okkurt um 1 mió. kr., ið eru knýttar at málsøkjunum. Harafturat koma tænastubústaðirnir til starvsfólk á Eiði, Borðuni og í Mykinesi, sum formelt ikki eru partur av yvirtøkuni, men sum møguliga verða latnir føroyskum myndugleikum. Kostnaðarmetingin av at reka vitaverkið fevnir eisini um rakstur og viðlíkahald av hesum bústøðum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Umsitingarliga verður mett, at yvirtøkan av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk ikki hevur stórar avleiðingar við sær fyri landið, av tí at myndugleikauppgávurnar eru avmarkaðar. Ætlanin er, at antin Sjóvinnustýrið ella Vørn skal yvirtaka uppgávurnar hjá Søfartsstyrelsen, heruppií útgávu av nautiskum ritum og altjóða samstarv, og hava samskipandi uppgávur á økinum, m.a. samstarv við Landsverk, MRCC og Arktisk Kommando. Víst verður til fylgiskjal 2 til lógaruppskotið, sum m.a. lýsir uppgávurnar á økinum.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ja, við yvirtøkuni fær landsstýrismaðurin heimildirnar, sum higartil hava ligið hjá donskum ráðharra.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Við hesi grein verður yvirtøkan formliga framd.

**Til § 2**
Yvirtøkan er sett at verða frá 1. januar 2020. Hetta hevur m.a. við sær, at umsitingin er klár at taka við uppgávunum, og at føroyskar reglur um sjóuppmerking v.m. kunnu verða settar í gildi samstundis sum málsøkini verða yvirtikin.

Løgmansskrivstovan, x. februar 2019

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Søfartsstyrelsens notat af 8. juni 2018 om spørgsmål i forbindelse med eventuel færøsk overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område
Fylgiskjal 3: Søfartsstyrelsens notat af 8. juni 2018 om internationale aftaler og forpligtelser samt mødefora i forbindelse med de færøske myndigheders evt. overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område
Fylgiskjal 4: Ummæli frá …